# Seksdaga leiðsluskeið

Statoil

## Orchestrating Winning Performance (OWP) 20.-25. juni 2010

Statoil Faroes bjóðar føroyskum fyritøkum at søkja fíggjarligan stuðul til at senda starvsfólk síni til leiðsluskeiðið Orchestrating Winning Performance 2010 hjá IMD í Sveis í summar. Stuðulin er fyri skeiðsgjald og gisting.

IMD er ein av heimsins fremstu handilsskúlum. Við støðu í Lausanne, Sveis, er skúlin ein alheims fundarstaður fyri leiðarar úr øllum heiminum.

Skeiðið er ætlað leiðarum og millumleiðarum í stórum og miðalstórum fyritøkum.

Meira fæst at vita um skeiðið á www.imd.ch/programs/peo/owp/

OWP gevur tær ein einastandandi møguleika til djúphugsni í seks dagar við spildurnýggjari greining, sum gevur tær yvirlit yvir alt frá heimsbúskapi til persónliga leiðslu. Tú fert eisini at alheimsgera tíni sambond við starvsfelagar úr øllum heiminum.

Umsøkjarar fáa umsóknarblað við umsóknartreytum við at venda sær til:

Louisu A. Fjallsbak,
**Statoil Faroes,**
undir Bryggjubakka 31,
PO Box 138,
110 Tórshavn
Tel. 357200

frlaf@statoil.com.

Skeiðið verður 20.-25. juni 2010 í Lausanne, Sveis. Seinasta freist at søkja er 12. apríl 2010. Umsøkjarar fáa svar innan 22. apríl 2010. Skeiðið verður lagað til til hvønn einstakan luttakara.

---

Á Høgabóli · 600 Saltangará · Tel 44 76 04    N. Finsensg. 18 · 100 Tórshavn · Tel 36 30 00

# Páskaprýði frá Rosendahl




Thomas Dam búnýti

---



Kopargøta 1
P.O. Box 206
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands
Tlf. +298 31 11 11
Fax +298 35 11 10
www.liv.fo

LÍV søkir eftir

# sølu- og marknaðarleiðara

Til sølu- og marknaðardeild okkara søkja vit eftir einum framfúsum leiðara at standa á odda fyri einum umráðandi parti av fyritøkuni.

**Starvsøkið**
Sum sølu- og marknaðarleiðari fært tú ábyrgdina av at samskipa sølu- og marknaðararbeiðið hjá LÍV. Tú fert eitt nú at stíla fyri samráðingum við fakfeløg og virkir um eftirlønarviðurskifti, eins og tú verður sjálvsagdur partur av arbeiðinum at menna fyritøkuna sum heild.

**Førleikar**
Tú hevur hægri útbúgving, til dømis cand.merc. í sølu og marknaðarføring ella aðra samsvarandi útbúgving.

Tú hevur harumframt eitt sjálvstøðugt arbeiðslag, ert íðin, hevur góð samstarvsevni og dugir væl at arbeiða í bólki. Tú hevur góðar førleikar at orða teg í skrift og talu. Tað er ein fyrimunur, men ikki eitt krav, at tú hevur leiðsluroyndir.

**Umsóknir og umsóknarfreist**
Umsóknir við avritum av prógvum, CV og øðrum skjølum skulu sendast til:

LÍV
Starvsfólkadeildin
Kopargøta 1
Postsmoga 206
110 Tórshavn

Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 16 apríl.

**Meira at vita?**
Hevur tú okkurt at spyrja um í sambandi við starvið, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Tummas Eliasen, stjóra, á telefon 212 919 ella á tummas@liv.fo.

LÍV er størsti veitari av lívs- og eftirlønartryggingum til fakfeløg og virkir.

SENDISTOVAN